# Konsessión
# til
# P/F Postverk Føroya
(Skrásetingarnummar 3927)

Við heimild í § 8, stk. 1 í løgtingslóg. nr. 135 frá 18. oktober 2001 um postvirksemi (postvirksemislógin) veitir landsstýrismaðurin P/F Postverki Føroya (Posta) hesa konsessión:

*Øki*

**§ 1.** Konsessiónin fevnir um vinnuligan postflutning. Konsessiónin er eitt loyvi og ikki ein einkarættur.

*Postkassar og frímerki*

**§ 2.** Posta verður harumframt veitt konsessión til at seta upp postkassar á alment atkomuligum støðum og at geva út frímerki.

*Flutningsskylda*

**§ 3.** Posta røkir, sbrt. § 4 stk. 2 í postvirksemislógini, skyldu landsins til postflutning um alt landið av hesum posti:

1) adresseraðum brøvum,
2) adresseraðum príslilstum, bóklingum, bløðum og øðrum prentaðum sendingum, eins til innihalds, ið ikki eru í bjálva,
3) tíðindabløðum, dag-, viku- og mánaðarbløðum og tíðarritum,
4) adresseraðum pakkum og
5) blindalestri

*Stk. 2.* Tað skal bera til at senda brøv og pakkar sum virðispost og brøv sum innskrivaðan post.

**§ 4.** Posta røkir, sbrt. § 4, stk. 1 í postvirksemislógini, skyldu landsins til postflutning av adresseraðum brøvum, pakkum og blindalestri frá sendarum uttanlands til móttakarar í Føroyum og frá sendarum í Føroyum til móttakarar uttanlands.

**§ 5.** Postflutningur, ið er fevndur av flutningsskylduni, skal veitast fyri sama prís um alt landið.

**§ 6.** Innlendis adresserað brøv verða borin út í seinasta lagi fjórða yrkadagin eftir, at tey eru Posta í hendi. Sama er galdandi fyri viku- og mánaðarbløð og tíðarrit, sbr. tó stk. 5.
*Stk. 2.* Innlendis adresserað brøv, sum skulu í postboks, eins og adresseraðir pakkar og dagbløð, verða borin út hvønn yrkadag, tó ikki leygardag.
*Stk. 3.* Fyri postflutning eftir stk. 1 og 2 er góðskumiðið, at 95% skulu verða útflýggjað eftir miðinum í stk. 1-2.
*Stk. 4.* Á hvørjum einstøkum postkassa skal standa, nær postkassin verður tømdur.
*Stk. 5.* Í tíðarskeiðinum 1. juli til 15. august verða innlendis adresserað brøv borin út í minsta lagi 2 yrkadagar um vikuna. Sama er galdandi fyri viku- og mánaðarbløð og tíðarrit.

**§ 7.** Posta skal árliga og fyri egna rokning kanna, um góðskumiðini í § 6 verða hildin.

TINGANES • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 30 66 60 • TELEFAX 30 66 65 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

*Postboksir*

**§ 8.** Posta skal tryggja, at postvinnurekandi, fevnd av § 3, stk. 1-3 í postvirkemislógini, hava atgongd til at taka ímóti posti til postboksirnar hjá Posta og at fáa postin útflýggjaðan hiðani.
*Stk. 2.* Posteftirlitið ásetur nærri treytir og kostnað fyri hesa tænastu.

*Almennar viðskiftatreytir*

**§ 9.** Posta skal hava almennar viðskiftatreytir fyri postveitingar, har Posta hevur flutningsskyldu.
*Stk. 2.* Í viðskiftatreytunum skal upplýsast um endurgjalds- og innlatingarreglur í sambandi við einstakar veitingar og tænastur o.a., eins og upplýsast skal um góðskumiðini.
*Stk. 3.* Posta skal geva viðskiftafólkum kæruvegleiðing um avgerðir, ið konsessiónshavin tekur viðvíkjandi postveitingum, har veitarin hevur flutningsskyldu.
*Stk. 4.* Posteftirlitið kann krevja broytingar í almennu viðskiftatreytunum.

*Ársfrágreiðing konsessiónshavans*

**§ 10.** Posta skrivar á hvørjum ári eina frágreiðing um postvirksemið. Greiðast skal frá menning felagsins higartil og um ætlaða framtíðarmenning, eins og greiðast skal frá, um settu góðskumiðini eftir § 6 eru rokkin.
*Stk. 2.* Frágreiðingin verður latin landsstýrismanninum og Posteftirlitinum fyri 1. september.

*Serligar umstøður og skyldur*

**§ 11.** Landsstýrismaðurin kann áleggja Posta at útinna serstakar uppgávur, hóast tær geva hall ella einki kasta av sær.
*Stk. 2.* Eru umstøðurnar óvanligar, skal konsessiónshavin taka øll neyðug stig fyri at tryggja postflutningin.

*Loyvi at stovna og brúka eina dátuskrá*

**§ 12.** Posta hevur loyvi at stovna og brúka eina dátuskrá. Dátuskráin fevnir um upplýsingar um postmóttakarar, sum Posta hevur skyldu at tryggja postflutning.
*Stk. 2.* Fyri at stovna og dagføra dátuskránna kunnu upplýsingar í elektroniskum líki fáast til vega úr skránni hjá Landsfólkayvirlitinum. Bara upplýsingar, nevndar í § 35, stk. 2, nr. 1-5, 7-8 og 10 í løgtingslóg nr. 41 frá 8. mai 2007 um fólkayvirlit, kunnu latast Posta.
*Stk. 3.* Upplýsingar um postmóttakarar, su
m verða latnar úr skránni hjá Landsfólkayvirlitinum eftir stk. 2, kunnu bara brúkast í sambandi við flutning av sendingum, fevndar av flutningsskylduni.
*Stk. 4.* Posta kann kortini brúka upplýsingarnar, nevndar í stk. 3, í sambandi við flutning av øðrum sendingum, sum ikki eru fevndar av flutningsskylduni, um fyrilitið fyri góðskuni og eini skynsamari skipan av postflutninginum ger tað neyðugt at avgreiða slíkar sendingar, og sendingar, fevndar av flutningsskylduni, saman.
*Stk. 5.* Aðramáta skal dátuskráin rekast eftir reglunum í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann broyta hesar treytir, sbr. § 8a, stk. 6 í postvirksemislógini og § 18 í konsessiónini.

*Prísásetingarmeginreglur og roknskaparreglur*

**§ 13.** Konsessiónhavin ásetur prísin fyri tænastur, fevndar av hesi konsessión.
*Stk. 2.* Í samráð við Posta ásetur Posteftirlitið hámarksprísir fyri tænastur, fevndar av § 3, stk. 1, nr. 1 um adresserað brøv, fyri tænastur, fevndar av § 3, stk. 1, nr. 3 um tíðindabløð, dag-, viku- og mánaðarbløð og tíðarrit, og fyri tænastur eftir § 4, tó undantikið fyri blindalestur og postflutning av adresseraðum brøvum, pakkum og blindalestri frá sendarum uttanlands til móttakarar í Føroyum.

*Stk. 3.* Posta skal kunna almenningin um prísbroytingar í seinasta lagi 4 vikur fyri, at broytingin kemur í gildi. Posta skal hava almennar listaprísir.

*Stk.4.* Ásetingin um somu prísir fyri alt landið forðar ikki fyri, at Posta gevur avsláttur av tænastum eftir stk. 2, t.d. av hópsendingum. Meginreglurnar um ikki-diskriminering og gjøgnumskygni skulu nýtast, um avsláttur verður givin.

**§ 14.** Prísir og gjøld skulu verða í samsvari við galdandi kappingarrætt.

**§ 15.** Í samráð við Posteftirlitið, og eftir at hann hevur konsulterað Posta, ásetur landsstýrismaðurin roknskaparreglur, sum m.a. skulu tryggja rættvísandi roknskaparhald og at neyðuga dátugrundarlagið er tøkt, tá metast skal um, hvørt kappinagrtreytirnar eru hildnar.
*Stk. 2.* Roknskaparreglur fyri Posta frá 6. apríl 2005 verða at galda, til annað er ásett.

*Altjóða viðtøkur o.a.*

**§ 16.** Posta skal halda tær samtyktir, sum verða gjørdar innan altjóða samstarv á postflutningsøkinum í UPU-høpi (Universal Postal Union), og aðrar millumtjóða avtalur á postøkinum, ið eru bindandi fyri Føroyar.

*Eftirlit við og broytingar í konsessiónini*

**§ 17.** Posteftirlitið hevur vegna landsstýrismannin eftirlit við, at konsessiónshavin heldur treytirnar í postvirksemislógini, kunngerðum og konsessiónini. Posteftirlitið kann áleggja Posta at lúka treytirnar í konsessiónini og postlóggávuni annars.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin og Posteftirlitið kunnu krevja, at Posta letur allar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at útinna eftirlitið, undir hesum eisini roknskapartilfar.

**§ 18.** Landsstýrismaðurin kann broyta konsessiónstreytirnar, um fortreytirnar fyri at veita konsessión vóru skeivar ella seinni eru broyttar, ella um broytt lóggáva ella altjóða sáttmálar, sum Føroyar eru bundnar av, gera broytingar neyðugar. Posta hevur ikki rætt til endurgjald fyri tílíkar broytingar.
*Stk. 2.* Konsessiónin kann eisini broytast, um landsstýrismaðurin og konsessiónshavin eru samdir um hetta.

*Loyvisgjald*

**§ 19.** Fyri hesa konsessión skal Posta bera kostnaðin av Posteftirlitinum í mun til sín marknaðarpart av føroyska postmarknaðinum (t.e. konsessionerað øki og fræls øki eftir postvirksemislógini). Kostnaðurin er grundaður á rakstrarkostnaðin av Posteftirlitinum árið fyri.
*Stk. 2.* Á hvørjum ári tann 20. januar fær Posta frá Posteftirlitinum eina fyribils uppgerð um gjaldið eftir stk. 1. Endaliga uppgerðin skal vera tøk í seinasta lagi 1. august sama ár.

*Gildiskoma*

**§ 20.** Henda konsessión er galdandi frá 14. februar 2019 til og við 31. desember 2020.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 14. februar 2019

Poul Michelsen
landsstýrismaður

/Herálvur Joensen